

## Funnu gull og kopar

Grønlendska námsvinnufelagið Nuna Minerals boðaði í gjár frá, at útlitini fyri at finna munandi nøgdir av gulli og kopari í Qussuuk, sum er einar 60 fjórðingar í landnyrðing úr Nuuk, eru góð. Ole Christiansen, stjóri, sigur við KNR, at felagið fer at skipa fyri boringum og øðrum kanningum í ár. Felagið hevur gjørt elektromagnetiskar kanningar í einum øki við tyrlu, og myndirnar vísa, at gull er at síggja har, Ole Chrisiansen við KNR.

*Nuna Minerals væntar at finna bæði gull og kopar (Mynd. KNR)*

# MBA-leiðarabúgving – uttan útbúgving

**Hugsar tú um eina leiðaraútbúgving? So er MBA avgjørt ein møguleiki. Nú vísa kanningar, at MBA-lesandi við praktiskum fortreytum standa seg betri enn tey, ið hava bókligar fortreytir**

LEIÐARAÚTBÚGVING

*Finnur Sivertsen, búskaparfrøðingur Business-line.fo*

MBA-lesandi eru kend fyri hava nógvar ymiskar førleikar í viðførinum. Nú vísir tað seg, at fólk við praktiskum royndum í mongum førum klára seg bertri enn tey, við akademiskum útbúgvingum.

Leiðarin hjá AVT (Associtation for Visionary Thinking) Dan Høyer, sum bjóðar eina hálvt ára leiðaraútbúgving, CBA, við møguleika at útbyggja til MBA, hevur gjørt sær tær royndir, at fólk uttan serliga útbúgving klára seg betri enn meðal. Tí kundi hann hugsað sær at sæð fleiri lesandi, uttan akademiska útbúgving, í sínum floksrúmum.

- Tað er sera harmuligt at vit ikki hava fleiri lesandi við praktiskum royndum. Hjá okkum hava tveir triðingar av studentunum høgar útbúgvingar, men tað sum stendur í lærubókunum kemur ofta frá teimum, sum hava royndir í vinnuni og duga spinna gull av tí, sigur Dan Høyer.



*Kristin Ølberg, ið er leiðari fyri MBA útbúgvingini á Handilsháskúlanum BI í Oslo staðfestir, at lesandi við verkligum førleikum standa seg væl.*

### Margfeldi avgerandi

Fleiri enn 56% av øllum MBA lesandi á Handilsháskúlanum BI í Oslo eru antin verkfrøðingar ella sivilbúskaparfrøðingar. Kristin Ølberg, ið er leiðari á MBA-útbúgvingini á BI hevur eisini bitið merki í, at studentar við verkligum royndum standa ikki aftan fyri tey, ið koma við hægri útbúgvingum í skjáttuni.

- Tað, ið eyðkennir okkara MBA-lesandi er at tey hava drúgvar arbeiðsroyndir og eisini hava fleiri leiðsluroyndir.

Vit hava sæð at fólk, ið ikki hava haft serligar útbúgvingar frammanundan, hava tikið okkara MBA-útbúgving við góðum úrslitið og hava síðan gjørt eina góða karrieru, sigur Kristin Ølberg.

Hon sigur, at tey á Handilsháskúlanum í BI helst síggja ein breitt samansettan skarða av luttakarum til teirra MBA-útbúgving. Umframt búskaparfrøðingar og verkfrøðingar hava vit luttakarar úr mongum yrkisgreinum, t.d. læknar, sálarfrøðingar, samfelagsfrøðingar, fólk úr verjuni, v.m., og vit fáa bert góðar afturmeldingar, sigur Kristen Ølberg.

### Eftirspurd leiðaraútbúgving

MBA leiðaraútbúgvingin á BI er sera nógv eftirspurd og áhugin fyri at søkja inn er ikki minkaður eftir at BI kom á listan hjá Financial Times yvir tey 50 bestu útbúgvingarstøðini í Evropa.

Mest vanliga orsøkin til at fólk velja at taka eina MBA útbúgving er tann, at hetta gevur betri arbeiðsmøguleikar og at leiðararnir verða knýttur saman í einum felags netverki. Samstundis er vanliga talan um eina munandi lønarhækking.

Meira enn 1000 lærdir háskúlar runt um í heiminum kunnu bjóða sínum lesandi eina MBA útbúgving og fleiri enn 100.000 lesandi kunnu hvørt ár prýða sítt CV við einum MBA prógvi.

MBA er ein stytting av Master of Business Administration. Útbúgvingin tekur 2 ár og er ein yvirbygningur til aðrar útbúgvingar ella verkligar royndir, har dentur verður lagdur á toppleiðslu í vinnuligari merking.

# Heimsins besta roknskaparúrslit

**Toppstjórin Rex W Tillerson í oljufelagnum Exxon Mobil í Texas, USA, kundi seinasta fríggjardag leggja fram besta roknskaparúrslit í søguni: 11,6 milliardir dollarar fyri 4. ársfjóðing 2007.**

ROKNSKAPUR

*Finnur Sivertsen, búskaparfrøðingur Business-Line.fo*

Samlaða úrslitið fyri alt árið 2007 gjørdist 40,6 milliardir dollarar, ella góðar 200 milliardir danskar krónur. Hetta er besta roknskaparúrslitið, ið nakrantíð er staðfest í søguni.

### 2,5 ferðir Ísland

Góða úrslitið hjá Exxon Mobil er ein avleiðing av, at oljuprísurin í fjør gjørdist met høgur.

Úrslitið uppá 200 milliardir kr svarar til børsvirðið á stóru oljusamtøkunum Norsk Hydro, Orkla og Yara tilsamans. Men úrslitið svarar eisini til 2,5 ferðir bruttotjóðarúrtøku Íslands.

Úrslitið í fjør gjørdist betri enn væntað. Serfrøðingar høvdu frammanundan mett, at partabrævið fór at hækka 1,95 dollarar. Úrslitið gjørdist 2,13 dollarar, skrivar TDN Finans.

### Framleiðslan minkar

Exxon Mobil stríðist sum mong onnur oljufeløg við at halda framleiðsluni uppi á verandi støði, men hetta tykist at verða trupult. Í 2007 hevði felagið eina framleiðslu uppá 2.517 milliónir føt um dagin og er hetta ein niðurgond uppá 0,161 mill. Talan er kortini um eina størri framleiðslu enn hjá Noregi tilsamans, ið framleiðir 2,2 mill. føt um dagin.

### Góða úrslitið fær øði í bila- og húsaeigarar

Góða úrslitið hjá Exxon Mobil skapir sum verða man gleði hjá eigaraskaranum. Men úrslitið kann eisini væntast at fáa sinnini í kók hjá hart sperdum amerikanskum bila- og húsaeigarum, ið halda seg gjalda meira fyri bensin og olju, enn neyðugt.

Samstundis fer nógva umrøðan av góða úrslitinum hjá Exxon Mobil aftur at seta eyka lív í tosið um, at leggja eykaskatt á stóru vinningarnar hjá amerikanskum oljufeløgunum.




*Toppstjórin Rex W Tillerson, í oljufelagnum Exxon Mobil, kann verða nøgdur: Úrslit 2007: 200 milliardir krónur, ið er tað besta í søguni.*